

Petur Joensen,stjóri á Jarðfeingi setir jarðfrøðisráðstevnu. Myndir Jens K Vang

# Føroyar og basalt á breddanum í Norðurlandahúsinum

**Jan Müller**

05.05.2015 - 17:47

Oljan.fo

Hesar komandi dagarnar er Norðurlandahúsið karmur um tvær jarðfrøðiligar ráðstevnur. Tann fyrra “2. Jóannes Rasmussen ráðstevnan” byrjaði í morgun og heldur fram mikudagin. Seinna ráðstevnan, sum snýr seg um boring í basalti, verður hósdagin. Tað er Jarðfeingi, sum er vertur fyri báðum ráðstevnunum, sum verða hildnar í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya. Luttakarar eru føroyingar og útlendingar, sum takast við jarðfrøðiligar spurningar í sínum arbeiði.

Jóannes Rasmussen ráðstevnan varð fyrstu ferð hildin í 2007. Evnið hesaferð er eins og seinast “Menning av Basaltumhvørvum”. Vísindafólk, ið arbeiða við basaltumhvørvum, tað verið seg føroyingar og útlendingar, skifta orð og hugskot til víðari menning av føroysku jarðfrøðini.

Seinna ráðstevnan, “Drilling Volcanics – a Conference on Drilling in Basaltic Provinces” er ætlað teimum, ið hava áhuga í boring í basaltumhvørvi. Seinastu árini hava fleiri og fleiri boringar verið at sæð í basalti og øðrum vulkanskum tilfari, boringar, ið ofta hava víst seg at vera tekniskt avbjóðandi.

Jarðfeingi hevur bjóðað fyrilestrarhaldarum úr olju- og veitarafeløgum, ið hava royndir við slíkum boringum, til Føroya at leggja sínar royndir av boringunum fram. Ætlanin er at skapa eitt pláss, har oljufeløg og veitarafeløg við áhuga í hesum boringum fáa høvi at skifta orð og hugskot um, hvussu ein gongd leið kann vera.

Tað var Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi, sum setti fyrru ráðstevnuna. Eftir tað greiddi Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur frá um Jóannes Rasmussen, sála, sum ein av undangongumonnunum innan føroyska jarðfrøðigransking – sum vísindamanni og pioneri. Hann var við til at kortleggja føroysku undirgrundina. Hansara motto var, at vitan er einki verd, um hon ikki verður brúkt og deild við onnur. “Tí eru vit eisini her í dag – í andanum hjá okkara fræga jarðfrøðingi,” segði Martin Heinesen.

Tað verður Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum, sum fer at seta seinnu ráðstevnuna um boring hósdagin.

















